# HYUNDAI

**Hyundai Sonata**

| | |
|---|---|
| 2,0 GLS, Executive | 216.750,- |
| 2,7 V6 GLS, automatic | 275.750,- |
| 2,7 V6 GLS | 258.750,- |

**Hyundai MPV**

| | |
|---|---|
| 2,0 GL | 270.750,- |
| 2,0 GL CRDi | 306.750,- |
| 2,0 GLS | 279.750,- |
| 2,0 GLS CRDi | 315.750,- |
| 2,7 V6 | 360.750,- |

**Hyundai Accent**

| | |
|---|---|
| 1,3 LS, 3 hurðar | 117.750,- |
| 1,3 LS, 5 hurðar | 128.750,- |
| 1,5 GLS, 4 hurðar | 137.750,- |
| 1,5 GLS. 5 hurðar | 137.750,- |
| 1,5 GS, 3 hurðar | 128.750,- |

**Hyundai Atos Prime**

| | |
|---|---|
| Standard sni | 108.750,- |
| Automatic gear | 124.750,- |

**Hyundai Elantra**

| | |
|---|---|
| 1,6 GL, 4 hurðar | 162.750,- |
| 1,6 GL, 5 hurðar | 166.750,- |
| 1,6 GLS, 4 hurðar | 171.750,- |
| 1,6 GLS, 5 hurðar | 175.750,- |
| 2,0 GLS, 4 hurðar | 180.750,- |
| 2,0 GLS, 5 hurðar | 184.750,- |

**Hyundai Matrix**

| | |
|---|---|
| 1,6 GL, 5 hurðar, MPV | 152.750,- |
| 1,5 GL, CRDI, 5h, MPV | 175.750,- |
| 1,8 GL, 5 hurðar, MPV | 162.750,- |

**Hyundai Santa Fe**

| | |
|---|---|
| 2,0 CDRi, (2-hj.tr.) | 306.750,- |
| 2,0 CRDi, (4-hj.tr.) | 351.750,- |
| 2,0 GL, (2-hj.tr.) | 252.750,- |
| 2,0 GLS, (4-hj.tr.) | 306.750,- |
| 2,7 V6, (4-hj.tr.) | 378.750,- |

**Hyundai Coupe**

| | |
|---|---|
| Standard sni | 247.750,- |

HONDA

**Civic 3 hurðar**
1.6i LS
**prísur frá 166.750,-**

**Civic 5 hurðar**
1.4i LS
1.6i ES
1.6i ES aut.
**prísur frá 166.750,-**

**Civic 4 hurðar**
1.6i LS
1.6i ES
**prísur frá 175.750,-**

**Accord**
2.3i LS
2.3i LS aut.
2.3i ES
2.3i ES aut.
**prísur frá 247.750,-**

**HR-V 5 hurðar**
1.6i
1.6i VTEC
**prísur frá 179.750,-**

**Stream**
1.7i LS
2.0i ES
2.0i ES aut.
2.0i ES Van
2.0i ES Van aut.
**prísur frá 228.750,-**



**CR-V**
2.0 RVSi
2.0 RVSi aut.
2.0 RVSi Van
2.0 RVSi Van aut.

**prísur frá 278.750,-**

ŠKODA

**Skoda Fabia**
Classic 1,4
Classic 1,4
Comfort 1,4
Comfort 1,4 - Ambiente
Elegance 1,4
Comfort 1,9 SDI 47 kW

HONDA NORÐBIL ŠKODA Volkswagen Group HYUNDAI

Box 1070 - Oyggjarvegur - FO 110 Tórshavn - Føroyar - Tlf. 313707 - Fax 310855






*Gomul mynd av Kongabrúnni í Havn. Uttast høgrumegin sæst skráin, har bilurin hjá Johannes undir Kletti og Júst Sivertsen varð fluttur á land av práminum, tá hann kom til Føroya við DFDS skipinum »Island«, 6. mai í 1922. Vit hava til stuttleika sett Ford T bilin hjá Hans Elmar Poulsen á Vatnsoyrum inn í myndina. Hann er sama sama slag Ford T – eisini frá 1922. Pílurin frá bilinum vísir okkum Ólavstovu, sum er einasta húsið á myndini, sum enn stendur sum tað stóð í 1922. Trappan vinstrumegin í myndini er trappan hjá Tryggingarfelagnum Føroyar*

# Fyrsti bilurin kom í land á Kongabrúnni

**Tann 6. mai í 1922 kom DFDS skipið »Island« á Havnina. Millum farmin var Føroya fyrsti bilur, ein Ford T lastvognur, sum Johannes Olsen og Júst Sivertsen keyptu frá smiðjunum, Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen í Havn**



*Hendan myndin av Kongabrúnni er tikin 2. mai 2002. Staðið, har fyrsti bilurin kom á land, er áleið har, vit hava sett Ford T'in hjá Hans Elmari inn í myndina. Pílurin vísir Ólavstovu, sum vit eisini síggja á myndini omanfyri. Alt annað í myndini er broytt – uttan kanska bryggjukanturin sjálvur – og kanska skráin hómast í bryggjukantinum enn tann dag í dag…?*

FYRSTI BILURIN
*Eirikur Lindenskov*

Komandi mánadag, tann 6. mai, eru liðin 80 ár síðani, at fyrsti bilurin trillaði á føroyskari jørð.

Tann dagin seldu Vilhelm Nielsen og Wenzel Petersen fyrsta bilin til Júst Sivertsen og Johannes Olsen í Havn. Talan var um ein Ford TT lastvogn, sum kom til landið við DFDS-skipinum, Island, hendan dagin.

Júst Sivertsen (føddur í 1892) var kendur bilførari í Havn. Men Johannes Olsen (føddur í 1894) doyði longu í 1924 av vanlukku, tá ein ketil sprongdist á nýggja Alexandrines Hospitali.

Ein teirra, sum var á Kongabrúnni, tá bilurin kom í land 6. mai 1922, var Oluffa Jensen *(Luffa í Gongini 1912-2000)* í Havn.

Hon var tá tíggju ára gomul, men hon minnist hendingina væl, tí Johannis og hon vóru systkinabørn – og vuksu upp í sama húsi undir Kletti í Havn.

Í viðtalu við Sosialin 12. juni 1996 segði hon:

– Eg minnist væl tann dagin. Nógv fólk var komið saman, og bilurin kom í land á einum prámi. Eg minnist ikki, hvørjum skipi hann kom við, men har var eingin, sum dugdi at koyra bilin. Hann var tí skumpaður niðan í Quillingsgarð, har Wenzel og Vilhelm høvdu smiðju.

– Johannes var tann fyrsti, sum koyrdi. Tað var danin, Plank (pápi Viggo Plank), sum lærdi hann at koyra.

Ta fyrstu tíðina var tað bara Hannes, sum koyrdi, segði Luffa.

Hannis førdi annars Reyða Kross, men fór seinni á hospitalið at arbeiða sum montørur, sum tað kallaðist.

– Tá haldi eg, at Júst tók yvir bilin, segði Luffa.

Hannis arbeiddi nógv, greiddi Luffa frá.

– Fysikus Herup hevði altíð boð eftir honum, og tað var eisini tí, at vit vóru millum tey fyrstu, sum fingu telefon. Minnist meg rætt, hvødu vit nummar 13. Hvussu nógv var at koyra fyrstu tíðina, minnist Luffa ikki reiðiliga.

– Men teir koyrdu við fólki, tað minnist eg væl. Teir koyrdu túrar niðan á Sanatoriið og aðrar túrar við. Minnist meg rætt, so kostaði tað 50 oyru fyri vaksin og 25 oyru fyri børn. Eg minnist væl, at Johannes hevði eina pappeskju við 25 oyrum undir seingini.

Um bilin sigur Luffa, at hon heldur hann var svartur ella rættuliga myrkur. Hann hevð ikki el-startara, men skuldi vindast í gongd.

Luffa andaðist í oktober 2000, 88 ára gomul.